

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 01 - 2013

# Biðja Obama steðga oljuleiting í Alaska

Shell noyðist kanska at endurskoða sínar ætlanir í Alaska, tí tveir av teimum fremstu ráðgevunum hjá Barack Obama, forseta mæla nú Kongressini í Washington til at steðga allari oljuleiting í teimum arktisku pørtunum av USA. Teir báðir ráðgevarnir, Carol Browner og John Podesta, skriva í einari grein á tíðindasíðuni Bloomberg View, at eftir teirri tykki kann eingin veita vissu fyri, at tað er trygt at bora eftir olju í Arktis. Eygleiðarar siga, at boðini frá teimum koma oljufelagnum Shell stak illa við, tí felagið hevur brúkt næstan 28 milliardir krónur til at fáa atgongd til oljuna og gassið í arktiskum sjóøki. Fyrr í hesum mánaðinum fór stjórnarumsitingin í Washington undir at kanna ætlanirnar hjá Shell í Alaska, eftir at felagið hevur havt trupulleikar við útgerðini og trygdini. Eitt nú fór ein pallur á land nýggjársaftan. Eingi nýggj loyvi Carol Browner og John Podesta skriva, at fleiri og fleiri ivast í, hvussu rætt tað er at fara undir oljuleiting í Arktis, og at hesin ivin kemur frá eitt nú vísindafólki, bankum, tryggingarfeløgum og enntá einstøkum oljufeløgum. - Umsitingin eigur ikki at geva Shell nakað nýtt loyvi í ár, og hon eigur at steðga arbeiðinum við umsóknum frá øðrum feløgum, sum vilja sleppa at bora í arktiska økinum, skriva teir báðir ráðgevarnir at enda.